LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavnar kommuna
Att.: Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóri
Postsmoga 32
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 21. september 2018
J.Nr.: LUM-30- 18/00094-1
(at tilskila í svari)

**Talgild plássbókingarskipan á dagstovnaøkinum**

Tórshavnar kommuna kunnger á heimasíðu síni tann 19. september 2018, at dagstovnapláss verða talgild.

Í tíðindaskrivi verður greitt frá, at framyvir skulu foreldur brúka eina nýggja talgilda plássbókingarskipan, sum kemur í staðin fyri gomlu bíðilistaskipanina. Til tess at bóka pláss á dagstovni skulu foreldur rita inn við Mínlykil, og upplýst verður, at Tórshavnar kommuna sendir foreldrunum váttan um pláss á Mínboks.

 Eg skal við hesum boða Tórshavnar kommunu frá, at eg umhugsi at taka hetta mál til viðgerðar av egnum ávum, sbr. § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini.

Eg fari í hesum sambandi at vísa Tórshavnar kommunu á niðurstøður mínar í tveimum málum, sum eg viðgjørdi í 2014. Bæði málini snúðu seg um ætlanir at leggja um til talgildar skipanir.

Onnur klagan snúði seg um, at lesandi skuldu søkja lestrarstuðul umvegis Mínboks, og hin snúði seg um, at lønarseðlar hjá almennum settum starvsfólkum einans fóru at verða sendir í Mínboks.

Eg skrivaði m.a. soleiðis í niðurstøðu míni viðv. klaguni um talgildar lønarseðlar, okkara j.nr. 14/00048:

> "...
> Ein myndugleiki kann ikki uttan serstaka lógarheimild krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi, ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Eg fari í hesum sambandi at vísa á viðgerð mína av hesum spurningi í skrivi, dagfest 3. februar 2014 til Studna um talgildar umsóknir um lestrarstuðul (j. nr. 201300055), har eg m.a. skrivaði soleiðis:

> "Tað er ongastaðni í lóggávuni generelt ásett, á hvønn hátt ein borgari kann ella skal venda sær til almennu fyrisitingina. Av tí at tað í lóggávuni ikki eru ásett serlig formkrøv, kann borgarin í útgangsstøðinum sjálvur gera av, á hvønn hátt hann vendir sær til fyrisitingina. Hetta er í fyrstu atløgu treytað av, at fyrisitingin tekniskt er før fyri at taka ímóti tí, sum sent verður. Í aðru atløgu kunnu tað í lóggávu vera ásett serlig formkrøv, sum t.d. brúk av serligum oyðubløðum og krøv um undirskrift, sum gera, at borgarin skal venda sær til fyrisitingina á ein ávísan hátt. Í aðramáta kann ein borgari venda sær til fyrisitingina í talgildum formi, velur hann tað. Ein myndugleiki hinvegin kann tó ikki uttan serstaka lógarheimild krevja, at skrivligt samskifti millum borgara og almenna myndugleikan skal vera talgilt. Ein myndugleiki kann ikki krevja, at ein borgari skal senda myndugleikanum skrivligt samskifti í talgildum formi, ella krevja, at borgarin skal móttaka brøv o.a. í talgildum formi frá myndugleikanum."
>
> ...
>
> Sum eg skilji brúkaratreytirnar fyri Mínboks (endurgivnar á www.minboks.fo, dagfestar 1. november 2012), kann ein brúkari av Mínboks ikki velja bert at móttaka post frá einum myndugleika og velja samskifti við aðrar myndugleikar og privat virki frá. Nýggja mannagongdin hevur tískil við sær eitt krav um, at øll alment sett starvsfólk uttan undantak mugu skráseta seg í Mínboks og móttaka post frá øllum myndugleikum og privatum virkjum, sum eru ella verða skrásett í Mínboks. Eitt slíkt krav krevur greiða lógarheimild.
>
> ..."

Sum tíðindini á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu eru orðað, verður talan um eina tvungna skipan, einki verður upplýst um, at víkjast kann frá mannagongdini, og tískil hevur skipanin við sær, at kravt verður, at øll, sum søkja um dagstovnapláss í Tórshavnar kommunu, skulu søkja umvegis eina talgilda skipan og skulu skrásetast í Mínboks.

Eg fari at heita á Tórshavnar kommunu um at greiða mær nærri frá ætlaðu plássbókingarskipanini við serligum denti á spurningin um heimildina at krevja, at borgarin skal samskifta talgilt við Tórshavnar kommunu, og á kravið um skráseting í Mínboks.

Plássbókingarskipanin verður sambært upplýsingunum frá Tórshavnar kommunu virkin 2. oktober 2018. Eg fari tískil vinaliga at heita á Tórshavnar kommunu um at senda mær frágreiðingina í seinasta lagi fríggjadagin 28. september 2018.

Eg leggi við avrit av niðurstøðum mínum í j.nr. 13/00055 og 14/00048.

Vinaliga

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður